## VIÐMERKINGAR

# Har fór skattalættin

## Javnaðar- og Tjóveldisflokkurin forkomu okkum skattalættan í Tórshavna Kommunu

**Jan Christiansen**
*býráðslimur*



Løgtingið vil geva ein skattalætta komandi ár, men á býráðsfundinum hóskvøldið tók meirilutin hendan skattalættan frá borgarunum í Tórshavnar kommunu. Til viðgerðar var fíggjarætlanin fyri Tórshavnar Kommunu fyri 2006, og sjálvt um kommunan ongantíð fyrr hevur verið so væl fyri fíggjarliga, vildu javnaðar- og tjóveldisumboðini í býráðnum kortini, at skattaprosentið í høvuðsstaðnum skuldi hækka við einum prosenti. Vit í minnilutanum - Fólkaflokkurin og Sambandsflokkurin - vildu varðveita verandi skattaprosent. Vit halda, at játtaði skattalættin veruliga skal verða ein skattalætti hjá okkum øllum. Men meirilutin ræður, so nú er bara at gjalda skattalættan upp á 22 mió. kr. í kommunukassan heldur enn í landskassan.

Minnilutin vísti á, hvussu væl kommunan nú er fyri fíggjarliga, m. a. tí at undanfarna býráð legði alla orku í at fáa tyngjandi skuldina burtur. Vit vístu á, at í undanfarna valskeiði vóru ikki minni enn 220 mió. kr. goldnar niður av kommunuskuldini, svarandi til 55 mió. kr. um árið. Vit vístu á, at tá býráðið, ið sat undan hesum, megnaði at stýra býnum væl og virðiliga, og harumframt kláraði at gjalda 55 mió. kr. niður av skuld um árið, so burdi ikki verði neyðugt at hækka skattin við at taka góðar 20 mió. kr. afturat frá borgarunum. Lat meg í hesum sambandi vísa á, at komandi ár er bert neyðugt hjá kommununi at gjalda 3,7 mió. kr. í rentum og avdrøgum, tí skuldin er goldin!

Eisini vísti minnilutin á, at kommunan nú fær afturgoldið 22 mió. kr. úr kommunala veðhaldsgrunninum, og at hesin peningur sjálvsagt skal inntøkuførast og koma fólkinum tilgóðar. Tað bleiv jú álagt borgarunum at gjalda eitt eyka skattprosent til hendan veðhaldsgrunn frá 1994 til 1997, so nú, tá nakað av hesum peningi verður afturgoldin, er einki meira náturligt enn at borgarin fær tað aftur, ið hann hevur goldið ov nógv.

**Uppskotið og grundgevingarnar frá minnilutanum:**

- Jan Christiansen, Høgni Mikkelsen, Sjúrður Olsen, Beate L. Samuelsen, Bjarti Mohr og Inga Dahl vísa á, at nú skattainntøkan er mett at hækka, og skuldin mest sum er goldin, og kommunan fær afturrindað nóvnan pening úr kommunala veðhaldsgrunninum, eiga hesir faktorar at koma borgarunum í Tórshavnar kommunu til góðar. Hetta kann gerast við ikki at hækka verandi skattaprosent á 18,75% og við at varðveita verandi barnafrádrátt á 5000 kr.

- Við hesum grundgevingum mælir minnilutin til at taka undir við hesum broytingum:

At afturrindan úr kommunala veðhaldsgrunninum verður inntøkuførd við kr. 22.000.000 kr., at lækka íløgurnar við 1.777.000 kr. til 96.223.000 kr. og at áseta skattaprosentið til 18,75 og barnadráttin til 5000kr.

**Oyðari kemur aftan á spararan**

Eg kenni ongan, ið heldur seg hava ov nógv, men ein sannroynd er, at hevur tú nógv at rutta við, so situr tú leysari á krónunum. Tí er ógvuliga umráðandi hjá okkum fólkavaldu at krevja sum minst inn í skatti. Hevur kommunan eina ógvuliga tronga fíggjarætlan at arbeiða við, verða býráðslimir verðuliga noyddir at fáa sum mest úr hvørjari skattakrónu; og tað er væl tað borgarin hevur krav uppá.

Vit, ið sótu í meirilutanum seinasta valskeið høvdu valorðið: »Meira fyri hvørja krónu«. Verandi meiriluti tykist hava broytt hetta valorð til: »Fleiri krónur fyri sama arbeiði«.

# Hugsið fyrst um ferðslutrygdina

**Nú aftur ein nýggj og stór verkætlan er í umbúna á samferðsluøkinum er neyðugt, at vit hesaferð fyrst hugsa um ferðslutrygdina. Í seinasta enda kemur ferðslutrygdin at hava ávirkan á kostnaðin í mun til nyttuna. Tí er tað óðamannaverk at leggja enn eina landsferðsluæðr gjøgnum fleiri bygdir**



**Rúna Sivertsen**
*Formaður*
*Ráðið fyri Ferðslutrygd*

Ferðslutrygdin varð als ikki tikin við í framløguni um Skálafjarðartunlarnar á fundinum á Svangaskarði í seinastu viku.

Tað er skelkandi, tí tað sigur eitt sindur um hugburðin tey, sum taka avgerðir í Føroyum hava, tá um ferðslutrygd ræður.

Og júst hugburðurin, vit hava til ferðslutrygdina, er helst orsøkin til, at vit missa nógv fleiri lív í ferðsluni enn grannalond okkara.

Vit kunnu ikki góðtaka ferðsluvanlukkur sum ein neyðuga fylgju av ferðsluni.

**Ferðslutrygdin í hásætið**

At fólk framhaldandi fara at gera mistøk í ferðsluni, sleppa vit neyvan undan. Men vit hava skyldu at laga viðurskiftini soleiðis, at fólk ikki doyggja ella fáa varandi mein av ferðsluvanlukkum

Í álitinum um Nullhugsjónina verður víst á, at ferðsluskaðar kosta føroyska samfelagnum slakar 200 milliónir krónur árliga.

Skulu vit tosa um nyttu og kostnað, verða vit noydd at taka hesi tøl í álvara.

At stigtakararnir til verkætlanina um Skálafjarðartunlarnar hugsa um nyttu og kostnað er sjálvsagt.

Men frá politiskari síðu má og skal trygdin og trivnaðurin í framtíðini raðfestast fremst í øllum, sum hevur við ferðslu at gera.

Landsverk hevur sum er, stórar trupulleikar av, at landsferðsluæðrar ganga ígjøgnum bygt økir.

Bæði til Ferðslutrygd og Landsverk fáa gjøgnum ár og dag nógvar áheitanir frá borgarum í teimum bygdum, sum liggja við hesar vegir, um at seta tiltøk í verk, so ferðin fer niður.

Tað er óðamannaverk at leggja eitt so stórt ferðslutrýst eftir einum vegi, sum gongur gjøgnum fleiri bygdir, heilt frá Søldarfirði til Runavíkar.

Alt hetta má politiski myndugleikin hava í huga, tá gerast skal av, hvør veglegging skal veljast í samband við ætlanina um tunlarnar millum Skálafjørðin og høvuðsstaðin.

# Undirsjóvartunnil millum Tórshavn og Eysturoynna

## Hvat sigur Tórshavnar Kommuna ella havnaborgarar?

**Álvur Danielsen**



Tað verður nógv tjakast um sambandið millum Tórshavn og Eysturoynna í hesum døgum. Undirsjóvartunnilin, sum nú sýnist at verða veruleiki innan alt ov nógv ár, hevur sett dik á hetta tjakið. Flest øll okkara munnu eisini gleðast um, at so skal verða?

Sjálvur gleðist eg eisini í so máta. Samstundis kann eg bert hugleiða um, hvussu trupul og drúgvur túrurin norður á Oyrarbakka kundi verða, tá eg sjálvur var smádrongur. Vegasambandið var so sum so - haldi meg hóma, at eg var borin tað eina strekkið fyri síðan at koma í annan bil. Seinni »Oggjarleiðir« og yvir um sjálvt Sundalagið komu vit til tíðir við róðrarbáti ella »Sigmundi« (tí hjá Jóan Peturi Andreassen ), seinni við »Sundaferguni«. So kom brúgvin í 1973 og í 1976 kom Norðskálatunnilin. Tá mundu fleiri halda, at her var komið á mál. Nú gjørdist ikki meira.

Tey sum eru enn eldri settu álitið á apostlarnar, nógv minnast enn »Trónd« ella »Streym« — nøkur heilt fá enntá mjólkarbátin »Ruth«, sum var fyrsta veruliga lopfjølin frá skytstíðini til tað útbygda samferðslusamfelagið, vit kenna í dag. Alt hetta upp á minni enn 100 ár.

Sum sagt, øll munnu gleðast um hetta, og so skal tað eisini verða. Inni á Eysturoynni gongur tjakið lívliga fyri seg, og ætlanirnar eru nógvar. Ein tunnil, tveir tunnlar, rundkoyring/ar, ringvegur/ir o. s. f. Okkurt er ávegis, annað á papírinum og sumt bert í hugaheiminum — enn.

Her í Tórshavn hoyrist ikki so nógv frá teimum, sum valda í býráðnum. Eingin klár útmelding, at býurin er fyrireikaður ella verður tað. Hetta at taka ímóti tí nógvu ferðsluni, sum tá verður. Eitt er víst, at okkurt skal gerast fyri at svølgja tað til ta tíð øktu ferðsluna. Longu komandi ár verður »Norðoyatunnilin« liðugur. Býurin veksur jú eisini og tað gevur í sjálvum sær fleiri avbjóðingar.

Vónandi hevur høvuðsstaðurin aðrar ætlanir enn bert at gera eitt stórt parkeringspláss uppi í Hoyvík, og só kunnu tey vitjandi stilla bilin - ganga ella taka býbussin oman í SMS ella gonguøturnar. Kenni eg Heðin rætt, bjóðar hann øllum vælkomnum. Men hvussu?

PS: Vænti annars ikki sjálvur at verða fyri, tá tað ógvusliga bilatalið søkir til Havnar, tá ið eg ikki havi nakað koyrikort sjálvur. Dumpaði nevniliga í føroyskum uppi á fyrrverandi Bileftirlitinum. Jú, ein rættartrygd og onnur ella mangul upp á sama. Kanska borgarstjórin, Heðin Mortensen setur álitið á Akstovuna, sum tað nú kallast.

# Rætting til rokning fyri haldaragjald

Í rokningini fyri haldaragjald, ið varð send við postinum 24. november, er tíverri ein feilur komin í.

Har stendur, at rokningin er fyri 01-10-05/31-12-05.

Tað rætta er sjálvandi 01-01-06/31-03-06.

Gjaldsfreistin, sum stendur niðast á inngjaldskortinum, er røtt, 31.12.2005

Vinarliga

**Sosialurin**

Lesið Sosialin - so eru tit við